## Stevnuskrá lýsast

Norðoya Sambandsfelag vil hava at vita frá leiðsluni í Sambandsflokkinum, hvussu grein eitt í stevnuskrá floksins skal skiljast. Í greinini stendur, at flokkurin vil føra "ein framfúsan politikk á kristiligum mentanarstøði", men lokalfelagið í Norðoyggjum er í iva um hetta, eftir at teir flestu tinglimirnir hjá Sambandsflokkinum atkvøddu fyri at broyta grein 266b í revsilógini. Tí vil felagið hava at vita, hvussu orðingin skal skiljast.

## Kunnu nú fáa lán

Løgtingið samtykti í gjár endaliga, at landsstýrismaðurin í innlendismálum kann loyva kommununum í Suðuroy at taka lán til at byggja ellis- og røktarheim í Vági. Upprunaliga vildi landsstýrismaðurin hava heimild til at geva kommunum í syðru helvt í Suðuroy loyvi at læna, men Løgtingið samtykti, at allar kommunurnar í oynni kunnu fáa somu heimild. Kommununnar partur av ellis- og røktarheiminum verður 26 mió. krónur.




*Her verður nýggi samleiki sparikassans "avdúkaður" av forstjóra, stjóra og nevndarformanni*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Eik Banki P/F er savningarmerkið

**Navnið Føroya Sparikassi er nú farið í søguna, og nýggi samleiki bankans er Eik Banki – í vanligari talu róptur Eik**

NAVNASKIFTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Marner Jacobsen, forstjóri, heldur, at nýggja navnið hóskar væl til virksemið bankans, og frameftir verður munandi lættari hjá bankanum at samskifta á útlendskum marknaði.

- Gamla navnið lýsir ikki longur virksemið hjá fyritøku okkara nóg væl, nú longu fleiri ár eru liðin, síðan vit fóru frá sparikassavirksemi til bankavirksemi. Við hesum verður navnið lagað til virksemið hjá okkum.

Hann sigur, at formliga navnið nú er Eik Banki P/F.

- Hetta hevur verið í umbúna leingi, og í gjár varð so nýggi samleiki okkara samtyktur á eyðaaðalfundi.

**Altjóða virksemi**

Forstjórin sigur, at navnaskiftið er eisini ein staðfesting av, at virksemið hjá fyritøkuni er vorðið meira altjóða seinnu árini.

- Við dóttirbankanum, Eik BankA/SíKeypmannahavn, lánsvirksemi og fíggjarligum áhugamálum í fleiri londum, er hent at hava eitt stutt og lætt navn – eitt navn, ið bæði kann sigast á føroyskum og flestu øðrum tungumálum.

Marner vísir á, at eik hevur sama týdning á føroyskum, íslendskum og norskum.

- Við navninum fylgir eisini ein nýggjur grafiskur samleiki. Hesin ber við sær, at búmerki, litir, bókstavir og sjálv sniðgevingin kring samskiftið og bankavirksemið verða nýggj.

**Sama rótfesti**

Forstjórin leggur dent á, at hóast broytingina, hevur nýggi grafiski samleikin og navnið kortini rót í sparikassanum og út við 175 ára longu søgu hansara.

- Hóast navnið er nýtt, er talan um sama peningastovn – við somu góðu starvsfólkum og kappingarføru tænastum.

Forstjórin, Marner Jacobsen, sigur seg vóna, at viðskiftafólk fara at taka væl ímóti nýggja samleikanum.




*Marner Jacobsen, forstjóri, Frithleif Olsen, nevndarformaður og Bjarni Olsen stjóri*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Lættari at m
# føra Eikina u

**Á tíðindafundi í morgun greiddi forstjórin í Eik Banka, Marner Jacobsen, í stuttum frá Føroya Sparikassa upp í gjøgnum tíðirnar, samstundis sum hann vísti á, at ein røð av útlendskum sparikassum og bankum hava skift navn seinastu árini**

NAVNASKIFTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Forstjórin vísti á ymiskar fyrimunir við nýggja navninum, og felags fyri hesar er, at tað verður lættari at marknaðarføra samtakið við nýggja navninum, Eik Banki.

- Fyritøkan er ein nútímans fíggjarfyritøka og ikki longur ein sparikassi. Dóttirfeløg fáa illa brúkt gamla navnið, og nýggja navnið hóskar væl í altjóða samanhangi.

**Øll fegnast**

Eins og Bjarni Olsen, stjóri, Frithleif Olsen, nevndarformaður og Ólavur Jensen á marknaðardeildini, segði Marner seg fegnast um nýggja navnið, búmerkið og visuella samleikan, sum samtakið nú hevur fingið.

- Árini frá stovnan í 1832 til umleið 1955 hevði fyritøkan einki búmerki. Fyrsta búmerkið kom miðskeiðis í fimtiárunum. Hetta var ein avlangur skjøldur við einum føroyakorti og navninum, Færø Amts Sparekasse.

Marner segði, at í 1957 var eikin fyrstu ferð at síggja í einum minningarriti og sum frá leið, trokaði hon skaldramerkið burtur.

- Navnið Føroya Sparikassi varð tikið í nýtslu í 1963, men í 1994 varð búmerkið aftur broytt. Tá fingu vit eikina, soleiðis sum vit kenna hana í dag.

Hann segði, at í 2002 varð navnið á fyritøkuni broytt til P/F Føroya Sparikassi.

**Broytta virksemið**

Forstjórin greiddi eisini frá gongdini hjá Føroya Sparikassa seinastu árini.

Hann ásannaði, at talan hevur verið um stórar broytingartíðir.

- Vit hava verið í øktari kapping, og nógv ferð hevur verið á virkseminum, sum seinastu árini hevur verið fyri stórum vøkstri.

Marner Jacobsen nam síðan við nøkur "týðandi fakta", sum hann tók til í síni framløgu á tíðindafundinum í morgun.

- Sparikassin varð fevndur av banka-og sparikassalógini í 1994, P/F Inni varð stovnað í 1998, í 2000 gjørdi felagið íløgur í Kaupthing FR og í Íslandi, í 2001 íløgur í Kaupthing Bank í Danmark – og í 2002 var Føroya Sparikassi umskipaður til partafelag.

Hann segði, at fyritøkan byrjaði at gera íløgur í Spron í Íslandi við ársenda í 2004, og 1. januar 2005 varð Eik Bank í Danmark keyptur.

At enda nevndi hann Realkreditt í november 2005 og íløgu í Ejendomsvækst í mai 2006.

**Framtíðarætlanir**

Marner Jacobsen nam eisini við strategi og framtíðarætlanir hjá Eik Banka í framtíðini.

Hann segði, at samtakið í enn størri mun enn higartil fer at váðaspjaða virksemi, og somuleiðis fer fyritøkan framhaldandi at effektivisera, automatisera og differentiera.

- Vit leggja stóran dent á at seta røttu fólkini í starv, og vit leggja stóran dent á útbúgving, eisini av



næmingum.

Marner Jacobsen segði, at Eik Banki fer at styrkja uppaftur meira um vøruútboðið, eins og samtakið ætlar at veksa enn meira um virksemið uttanlands við eitt nú øktum virksemi í teimum londum, har fyritøkan longu er virkin.

- Vit hyggja eisini at